# Fiskimálaráðið sum ein opnahjallur

**– Sagt verður, at royndir eru gjørdar at rudda upp í óskilinum í Fiskimálaráðnum, men skulu vit trúgva einum parti av tí, sum fer um junglutelegrafarnar í fiskivinnuni, hevur støðan ongantíð verið verri enn tann sama. Her valdar reint anarki, og Fiskimálaráðið er sum ein opnahjallur, tá ið ræður um at útflýggja nýggj fiskiloyvir, sigur Torbjørn Jacobsen, løgtingsmaður, sum hevur sett Bjørn Kalsø, landsstýrismanni í fiskivinnumálum, munnligar fyrispurningar**

FISKILOYVIR
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Spurningarnir hjá Torbirni Jacobsen eru ikki færri enn átta í tali, og allir snúgva teir seg um loyvir til uppisjóvarveiði.

Í fyrsta lagi spyr løgtingsmaðurin, hvussu nógvar umsóknir liggja í Fiskimálaráðnum um loyvi at flyta inn skip til fiskiskap eftir uppisjóvarfiski.

Í øðrum lagi spyr hann, um landsstýrið ætlar at økja um uppisjóvarflotan við at útflýggja nýggj loyvir umframt tey, sum higartil eru latin og eru í brúki.

- Um tað er ætlan landsstýrisins at økja um uppisjóvarflotan – hvørji eru tá kriteriini fyri, at hesi loyvi fara at verða givin?

Torbjørn spyr eisini, at nakrar ætlanir fyriliggja um at skifta gomul skip um við nýggj – og um so er, vil hann hava at vita, hvussu støddarlutfallið er millum hesi skip.

Løgtingsmaðurin sigur, at soleiðis sum støðan er, er verandi floti heilt náttúrliga í holt við at styrkja sína støðu við at keypa upp loyvir, sum frammanundan eru í umfari í skipanini. Hesi loyvi verða keypt fyri tíggjutals miljónir krónur.

– Sær landsstýrismaðurin ongan vanda við einum politiskum inntrivi í hesa gongd, sum tað má haldast at vera at útflýggja nýggj loyvir í uppisjóvarvinnuni?

Torbjørn spyr eisini, hvørjar treytir fylgja einum loyvi, um loyvir verða latin.

- Her hugsi eg serliga um, at sama loyvi í verandi skipan hevði kostað sama loyvismóttakara ótaldar miljónir krónur, og at handilin eins væl kann ganga hinvegin.

Og løgtingsmaðurin heldur fram at spyrja:

– Fyriliggur nøkur ætlan um at lata nýggj loyvir, og um realitetsviðgerð er farin fram í viðkomandi máli – fyriliggur tá nøkur fyrisitingarlig og lívfrøðilig tilráðing í málinum? Ella verður talan bert um eina reint politiska avgerð?



Torbjørn Jacobsen, løgtingsmaður, brúkar orðið anarki, tá ið hann umrøður Fiskimálaráðið og sigur, at ráðið kann samanberast við ein opnahjall, tá ið ræður um at útflýggja nýggj fiskiloyvir



– Eg vóni, at Bjørn Kalsø, landsstýrismaður í fiskivinnumálum, megnar at svara mínum spurningum um fiskiloyvir, soleiðis at friður aftur kann koma í vinnuna, sigur løgtingsmaðurin

Torbjørn heldur, at tað er torført at fáa greiði á yvirskipaða loyvispolitikkinum hjá nýggja landsstýrismanninum í fiskivinnumálum.

## Reint anarki

Í viðmerkingum sínum til fyrispurningin, vísir løgtingsmaðurin á, at nógv órógv hevur verið um arbeiðslagið og avgerðirnar, sum tiknar hava verið í Fiskimálaráðnum seinastu árini.

- Royndir sigast hava verið gjørdar at rudda upp í óskilinum, men skulu vit trúgva bara einum parti av tí, sum nú fer um junglutelegrafarnar í fiskivinnuni, hevur støðan ongantíð verið verri enn tann sama.

Torbjørn fer so langt sum at siga, at talan er um reint anarki, og at Fiskimálaráðið er sum ein opnahjallur, tá ið ræður um at útflýggja nýggj fiskiloyvir.

- Nýuppfunnin kriteriir hava verið nevnd, og nú sigst partapolitikkur aftur at vera komin í loyvispolitikkin. Nøkur mál hava verið frammi á tingi, har landsstýrismaðurin hevur havt ilt við at vart seg.

Løgtingsmaðurin vónar tó, at Bjørn Kalsø megnar at svara hansara spurningum, soleiðis at friður aftur kann koma í vinnuna.

- Er tað nakað, sum kann destabilisera eina vinnu, er tað ein subjektiv og partapolitisk stýring av henni, soleiðis sum Sambandsflokkurin eftir øllum at døma ætlar sær at stjórna høvuðsvinnu landsins tey næstu nógvu árini, sigur Torbjørn Jacobsen.

# Úr Barentshavinum í Irmingarhavið

**Á seinasta túrinum hjá Akrabergi í Barentshavinum fingu teir ikki uppí, men hin fyrra túrin í vetur høvdu teir fulla last. Nú verður gjørt klárt at fara á kongafiskaveiði í Irmingarhavinum**

FISKIVINNA
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Akraberg kom aftur úr Barentshavinum, mánadagin 26. apríl. Veiðan er løgd upp hjá Northern Fish Cold Storage í Klaksvík, og síðan tá hevur skipið ligið í Saltangará. Væntandi loysir Akraberg aftur í komandi viku, og tá verður farið í Irmingarhavið á kongafiskaveiði.

Reiðarin, Anfinn Olsen, er í løtuni á matvørumessu í Belgiu, men á skrivstovuni hjá reiðarínum siga tey, at lastin hjá Akrabergi hendan túrin var mett til eini 250 tons av flaki.




*Eftir at hava verið tveir túrar í Barentshavinum í vetur og í vár, fer Akraberg nú í Irmingarhavið at royna eftir kongafiski*
*Mynd: Vilmund Jacobsen*

Akraberg fór úr Føroyum, 17. mars, so hetta hevur ikki verið nakar langur túrur. Teir hava bara roynt í russiskum sjógvi í Barentshavinum. Í byrjanini var væl at fáa, men sum tíðin leið, fekst lítið og einki.

## Fulla last

Hetta er annar túrurin hjá Akrabergi í Barentshavinum í vetur. Hin fyrra túrin, sum vardi í 60 dagar, høvdu teir fulla last, 453 tons av flaki.

Fyrra túrin royndu teir bæði í norskum og russiskum sjógvi, og fiskiskapurin var góður.

32 mans eru við Akrabergi, tá ið teir eru eystanfyri. Í Irmingarhavinum eru teir vanliga 28 mans við skipinum.



# Tórshavnar Kommuna hevur onki í skuffuni til nýggja Smyril

**Borgarstjórin í Havn kennir onki til, at arbeitt verður við ymsum ætlanum fyri at geva nýggja Smyrli atløgupláss í Havn. Tvørturímóti fer Tórshavnar Kommuna ikki undir stórar útbyggingar fyri at tryggja Smyrli fast pláss í Havn**

SUÐUROYAR-SIGLINGIN
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

Tað verður ikki arbeitt við øðrum loysnum fyri at útvega nýggja Smyrli fast atløgupláss í Havn.

Tað staðfestir borgarstjórin í Havn

Í degi og Viku í gjárkvøldið bórust tíðindi frá landsstýrismanninum í vinnumálum og landsstýrismanninum í mentamálum, at orsøkin til at ongin avgerð verður tikin um at økisfriða Tinganes, er tann, at arbeitt verður við at finna nýggja Smyrli annað atløgupláss í Havnini.

Men hetta kennir Jan Christiansen, borgarstjóri, onki til.

Sostatt staðfestir borgarstjórin tað, sum havnameistarin í Havn segði við Sosialin í gjár um, at ongin gongd er í arbeiðnum um at finna nýggja Smyrli fast atløgupláss í Havnini og at ongar ætlanir eru um nakrar útbyggingar.

– Tórshavnar Kommuna hevur víst á eina loysn og og tað var at gera ferjulegu til nýggja Smyril á Bursatanga, uttan á Norrønu.

– Hetta er ein loysn, sum er fult forsvarlig tí tað er bara nakrar heilt fáar ferðir um vikuna, at Smyril og Nørrna.

Men tað er alt, ið bendir á, at Tórshavnar Kommuna ikki sleppur at fremja hesa ætlanina í verki, tí at økið verður økisfriða út á 10 metra dýpi.

Og Jan Christiansen sigur, at Tórshavnar kommuna hevur framvegis onga loysn og tað verður heldur ikki arbeitt við nakrari ítøkiligari loysn.

Kortini minnist hann, at løgmaður hevur boðað frá, at hetta er ein trupulleiki, sum Tórshavnar Kommuna ikki eigur at standa einsamøll við.

– Tað tekur hann sum eitt tekin um, at landið er sinnað at betala fyri atløguplássið til nýggja Smyril í Havn, eins og landið hevur betalt í Suðuroy.

Hann sigur, at sjálvsagt eru aðrir møguleikar at gera atløgupláss til nýggja smyril - bara onkur vil betala fyri teir.

Men kommunan hevur ikki hesar møguleikar.



*Ætlanin at gera nýtt atøgupláss til nýggja Smyril er ikki komin nærri seinastu dagarnar og tað er ongin loysn í eygsjón. Samstundis ger borgarstjórin í Havn greitt, at landið má betala ferjuleguna*

– Skal ein onnur loysn finnast, tosa vit um eina útbygging, sum kostar nakað íð líkist hundrað milliónir. Og tað hvørki kann kommunan loyva sær og enn minni hevur hon ráð til tað.

Sostatt staðfestir borgarstjórin, at tað verður í hvussu so er ikki Tórshavnar Kommuna, sum fer at betala fyri eina aðra loysn til nýggja Smyril.

Ein loysn, sum hevur verið nevnd, er, at gera ferjulegu til nýggja Smyril í krókinum undir Skipafelagnum.

Men so mugu skipini hjá Skipafelagnum ryggka eina skipslongd longur út á Molan og borgarstjórin hevur fyrr boðað frá, at tað fer kommunan ikki at áleggja Skipafelagnum.

Samstundis er tað ein spurningur um nýggi Smyril grynnur har. Hasnn stingur 5.60 metrar og dýpið er ikki meiri enn 5,80 metrar á fjørðu, so har í hvussu so er ikki nógv at geva av.

## Mugu seta okkum saman

Jan Christiansen staðfestir somuleiðis einaferð enn, at Tórshavnar Kommuna vil fegin hava Smyril til Havnar.

Men nú landið mest sannlíkt ikki vil taka av tilboðnum frá Tórshavnar kommunu, liggur bólturin hjá landsstýrinum.

– Eg haldi, at vit eiga at seta okkum saman fyri at vita, hvbørjir møguleikar eru. Men í hesum sambandi skulu vit tosa um møguleikar, sum eru ógvuliga tætt knýttir at, hvør skal gjalda.

– Vit mugu fáa greitt at vita, hvat landið er sinnað at spjaða til, tí vit fara ikki at brúka tíð og orku til at viðgera møguleikar, sum landið ikki vil betala.

– Og tað verða ikki vit, sum fara at brúka nakað, sum líkist hundrað milliónir uppá at útvega nýggja Smyrli atløgupláss.

Jan Christiansen sigur, ein bólkur av fakbólki varð settur á sinnið við umboðum frá Tórshavnar Havn, Landsverkfrøðinginum og Strandferðsluni.

– Men tað, sum lá í kortinum var, at tann bólkurin skuldi tosa um ætlaða atløguplássið til Smyril inni á Bursatanga, har Kommunan hevur ætlað at gera hana.

# Rótin til alt ilt á Drelnesi skal sprongjast burtur

**Beint uttan fyri Drelnesi er ein grynna og tað er hon, sum fær skyldina fyri, at tað er so nógvur suður við atløgubryggjuna, men nú skal hon sprongjast burtur**

HAVNAÚTBYGGING
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*



Havnin á Drelnesi á Trongisvágsfirði, hevur gingið mangt omanyvir seg. størsta atfinningin ímóti henni hevur verið, at er nakað at í sjónum, er hon so ókyrr, at har er ikki liggjandi hjá skipum.

Tey, sum halda seg vita, siga, at atvoldin til allan suðin, er ein grynna, sum er beint uttanfyri havnalagið.

Men nú skal hendan grynnan sprongjast burtur.

Tað er Tvøroyrar kommuna, sum tekur stig til arbeiðið og á býráðsfundi á Tvøroyri mánakvøldið, varð samtykt at spreingja grynnuna burtur.

## Fáa tvey fyri eitt

Eitt stórt byggifelag, Articon, er á Trongisvágsfirði kortini, har teir gera nýggju samferðsluhavnina til Smyril og býráðið á Tvøroyri fær sostatt tey fyri eitt.

– Av tí, at Articon er á fjørðinum frammanundan við øllum amboðum og allari útgerð, sum krevst, kann arbeiðið gerast nógv bíligari enn annars, varð upplýst á býráðsfundinum.

Byggifelagið hevur kannað málið og er komið eftir, at talan verður kanska um seks spreingingar og hvør spronging kostar 50.000 krónur, tá ið alt er tikið við og grótið fingið upp av botni.

Talan er um eini 1000 rúmmetrar av gróti, sum skului sprongjast burtur og burturbeinast.

Býráðslimir førdu fram, at vísti hetta seg ikki at hjálpa upp á ókyrruna, var arbeiðið als ikki burturspilt kortini, hetta fór undir øllum umstøðum at gera havnina betri.

Verður grynnan sprongd burtur, kunnu skipini leggja beint at. Sum er, noyðast tey at sigla útum grynnuna og síðani bakka at bryggju og tað er óheppið hjá stórum skipum.

Býráðið hevur eisini samtykt at gera ábøtur á gomlu bryggjuna á Drelnesi, har tað er máað so nógv undan tveimum kistum, at vandi er fyri, at tær koppa, kemur tung ferðsla oman á keiina.

Tað arbeiðið fevnir um at stuðla uppundir kisturnar við 20-25 rúmmetrum av betongi og tað arbeiðið er mett at kosta nakað yvir 100.000 krónur.